Ajax og Heini vunnu

Fríggjakvøldið bragdaði aftur hjá Ajax Keypmannahavn í bestu donsku hondbóltsdeildini. Ajax hevði vitjan av TMS Ringsted í Bavnehøjhøllini, og vann Ajax 23-19, aftaná at hava verið á odda 11-6 í hálvleikinum. Hetta er bert annar sigurin hjá Ajax Keypmannahavn í 7 dystum í hesum kappingarárinum. Heini Hanusarson var ikki so eyðsýndur hesaferð. Hann fekk eina tveir minuttirs útvísing, men hann skeyt einki mál á hesum sinni. Heini hevur annars skotið 21 mál í teimum 6 undanfarnu dystunum.

Stríddust sum svakir

Týska stórfelagið FC Bayern fekk umsíðir eitt sindur at fegnast um, tá liðið vann 1-0 ímóti Karlsruhe um vikuskiftið. Venjarin hjá felagnum, Jurgen Klinsmann, var fegin eftir sigurin, sum er tann fyrsti í fýra dystum. - Vit stríddust sum svakir. Hetta var ein sera týðandi sigur, sum far okkum eitt sindur upp á stigatalvuni, segði Klinsmann eftir sigurin. Bayern er nummar 11 í Bundesliguni.

Neistin-H71 32-31 (15-13):

Verjuloysi á Hálsi

Góð álop, góðir málverjar og vánaligar verjur. Tað vóru eyðkennini í dystinum á Hálsi, tá Neistin fyribils krøkti H71 av í oddastríðnum

Halgir Dahl Olesen spældi allan dystin á strikuni fyri H71. Her er hann í nærdysti við Jugoslav Djumic úr Neistanum
Mynd: Álvur Haraldsen

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
Jakup@sosialurin.fo

Hóast eitt mál er tepurt, so er tað nóg mikið. Í so máta greiddi Neistin sína skyldu, tá H71 vitjaði um vikuskiftið. Sigurin ber nevnliga við sær, at Neistin nú er einsamalt um at elta oddaliðið úr Vestmanna, sum enn hevur fult stigatal.

At Neistamenn eru nøgdir um stigini, er lítil ivi um. Hinvegin eru teir neyvan serliga væl nøgdir við spælið, sum als ikki livir upp til tað, sum krevst, um nakað FM-heiti skal endurvinnast.

Vána verjur

Dysturin sunnudagin var fyri tað nógva merktur av, at verjurnar hjá báðum pørtum høvdu ilt við at stilla seg rætt.

Hjá Neistanum eru fleiri sterkir individualistar, og tað var fyrst og fremst við avrikum frá hesum, at teir bláu vunnu sær hálvleiksleiðsluna. Og so eiga málverjarnir heldur ikki at gloymast. Tí hóast lítið høpi var í verjuspælinum, so stóðu Magnus Matras hjá Neistanum og Levi Nybo og Jens Skipagøtu hjá H71 allir ein fínan dyst, har teir upp á skift tóktust geva liði sínum avgerandi fyrimunin.

Eftir steðgin vóru tað hoyvíkingarnir, sum komu betur avstað. Fyrst og fremst fingu teir skil upp á verjuna, sum kom langt út at dekka. Tað órógvaði Neista-spælið, og tí gjørdist talan um tað nógva um skotroyndir útifrá.

Og í hinum endanum var Danni Syhler um at gerast heitur. Ferð eftir ferð smoygdi hann sær ígjøgnum, og gekk hetta ikki, so var bara at tveita bóltin út á veingin, har Dánjal Tórgarð var mest sum ósvikaliga tryggur.

Onkursvegna megnaði Neistin tó alla tíðina at halda fast. Tróndur Kragesteen hevði fleiri avgerandi gjøgnumbrot við skoringum, og samstundis hevði H71 hug at kiksa, hvørja ferð teir veruliga høvdu møguleikan at toga seg leysar.

Vóru kaldari

Hetta seinasta kundi bent á, at hoyvíkingarnir ikki eru nóg kaldir, tá á stendur, og tað varð eisini undirstrikað seinastu løtuna av dystinum.

Hoyvíkingarnir vóru støðugt á odda seinasta korterið av dystinum, men avgerandi bóltarnir vildu ikki inn. Ein útvísingar gjørdist eisini dýr, soleiðis at Neistin fekk smoygt seg upp á 32-31. Og hóast teir bláu misnýttu yvirtalsstøðu, tá leiðslan kundi verið sementerað, so bøtti tað ikki tað stóra hjá hoyvíkingum, sum altso mistu tvey stig, sum teimum als ikki nýttist at missa.

Men hondbóltur er nú ofta soleiðis, at tað eru teir seinastu minuttirnir, sum telja mest, og verður roknað eftir tí frymlinum, var sigurin hjá Neistanum uppiborin.

FAKTA um dystin

Fakta um dystin
Neistin-H71 32-31 (15-13)
10 min: 4-4
20 min: 10-8
40 min: 23-20
50 min: 29-29
Málskjúttar
Neistin: Tróndur Kragesteen 11, David Edvardsen 6, Áki Mørk 5, Finnur Hansson 4, Jugoslav Djumic 3, Blagoje Buha 2(1), Bogi Berg 1, Karl Herup Olsen 1
H71: Danni Syhler 9, Dánjal Tórgarð 8(2), Halgir Dahl Olesen 6, Esbern Patursson 4, Regin Joensen 3, Janus Sørensen 1
Brotskøst: Neistin 3, H71 3
Útvísingar: Neistin 3, H71 2
Dómarar: Kári Hansen & Sámal Paulason.

Ikki nóg kaldir

Halgir Dahl Olesen, sum sunnudagin spældi á strikuni allan dystin, iðraði seg um, at hann og liðfelagarnir ikki vóru eitt lítið vet kaldari á degnum.

- Tað er keðiligt at tapa hendan dystin. Vit gera nakrar býttar tekniskar feilir, tá vit ikki mugu gera teir. Eitt nú, tá teir vinna tvey mála leiðslu hjá okkum aftur. Og móti endanum brenna vit ein 100% møguleika, so tað eru dýr mistøk.

Og er tað vantandi orka, ella megna tit ikki at halda høvdinum kalt?

- Tað kann vera orkan, men eg rokni ikki við tí. Men vit mugu halda høvdið kalt og ikki gera mistøk móti dystarenda, segði Halgir Dahl Olesen.

-mørk

Høvdu marginalarnar

Ingi Olsen, venjari hjá Neistanum, helt ikki, at talan hevði verið um nakran framúr hondbóltsdyst, tá hansara menn hingu við í oddinum við tepra sigrinum á H71.

- Tað er ikki altíð, at spælið verður so pent í slíkum dystum. Men har er spenningur alla tíðina, og vit klára so akkurát at draga longra stráðið.

Men hvat var tað, sum var munurin á liðnum?

- Tað er ilt at siga, tí talan er veruliga um marginalar. Men kanska er tað avgerandi, at vit seinastu løtuna av dystinum fáa verjuna uppaftur. Tá vit klára at bremsa Syhler, sum annars var farin ígjøgnum einar seks ferðirnar, hava teir ikki so øgiliga nógv meira. Og hinvegin hava vit nakrar sterkar einstaklingar, sum tíbetur toga sigurin heim, sigur Ingi Olsen.

-mørk